LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, tann 15. mai 2025
J.Nr.: LUM-16- 24/28933-22
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

# Álit
um málsviðgerðina hjá Tórshavnar kommunu av einari umbøn um innlit

## 1. Niðurstøða umboðsmansins

*Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um málsviðgerðartíðina og málsviðgerðina hjá Tórshavnar kommunu av einari umbøn um innlit. Tórshavnar kommuna gav eftir 44 døgum klagaranum noktandi svar til umbøn hansara um innlit. Tórshavnar kommuna hevði í hesum tíðarskeiði ikki givið nakra kunning til klagaran um orsøkina til seinkanina, og nær ein avgerð kundi væntast. Hetta helt umboðsmaðurin vera átaluvert. Umboðsmaðurin helt eisini, at grundgevingin, ið Tórshavnar kommuna hevði givið klagaranum, ikki leyk kravið um grundgeving í fyrisitingarlógini. Tá Tórshavnar kommuna vísti til § 13, stk.1, nr. 5 og 6 í innlitslógini, átti kommunan eisini at greitt frá, hví kommunan var komin til ta niðurstøðu, at umbønin um innlit ikki kundi latast, vísandi til hesa rættarreglu, umframt hvørji atlit høvdu verið avgerandi fyri hesari avgerð. Einans at vísa til rættarregluna sum grundgeving helt umboðsmaðurin als ikki vera nøktandi. Umboðsmaðurin helt eisini, at lýstu viðurskiftini í málinum ikki kundu rúmast í heimildargrundarlagnum í § 13, stk. 1, nr. 5 og 6. Harafturat helt umboðsmaðurin tað vera atfinningarsamt, at Tórshavnar kommuna ikki hevði viðgjørt møguleikan at gera klagaran kunnigan við upplýsingar, ið ikki vóru undantiknar skjalainnliti, sambært § 13, stk. 1 nr. 5 og 6, sonevnd ekstrahering. Umframt hetta vísti umboðsmaðurin á, at Tórshavnar kommuna ikki hevði hildið tær klagumálsfreistir, ið umboðsmaðurin hevði sett, og at kommunan átti at verið vitandi um týdningin av at halda hesar freistir, ið settar vóru til klagumálsviðgerðina. Umboðsmaðurin gav samanumtikið Tórshavnar kommunu eina átalu fyri málsviðgerðartíðina og málsviðgerðina av umbønini um innlit.*

## 2. Klagan

Við telduposti, tann 18. desember 2024, sendi A, hereftir nevndur klagarin, klagu til umboðsmannin um avgerðina hjá Tórshavnar kommunu í einum innlitsmáli. Klagarin skrivaði millum annað:

> "Eg bað um innlit tann 30.10.2024.
> Tá eg onki hoyrdi aftur, bæði skrivaði og ringdi eg til kommununa, og journalførarin legði - fleiri ferðir - boð til ...,(*kommunustjóran, mín viðmerking)*, sum hon segði, hevði málið um hendi.
> Eg skal tí kæra tað longu svartíðina.

Og eg skal kæra undanførsluna ”av misgáum”, tí...,(*kommunustjórin, mín viðmerking)* skrivar: ”Av misgáum hevur tú ikki fingið svar uppá innlitsumbøn tína niðanfyri, kommunan umber hetta”.
Um so er, so er talan um í minsta lagi fimm eftirfylgjandi ”misgáum”.
Eg skal eisini kæra svarið eg havi fingið, og tær grundgevingarnar kommunustjórin vísir til, tí um okkurt skuldi verið dult, so kann tað ikki umfata fundarbøkur og almennar býráðsatkvøðugreiðslur, at tær koma undir nevndu greinir, tí tað bleiv viðtikið á almennum fundum.
Eg vil eisini kæra formin tænastumaðurin nýtir, at hann sendir frá sínari egnu teldupostadressu og ikki – í minsta lagi – eisini sendir cc til Tórshavnar kommunu, so avgerðin kann vera skrásett á rættan hátt.
Eg havi fingið upplýst, at kommunan hevur biðið eitt verkfrøðingafelag kanna uppskotini hjá Landsverk, og ei heldur slíkt kann koma undir nevndu greinir.
Lógargreinirnar vísa eisini á, at um okkurt er neyðugt at dylja, eigur tað at vera latið innlit í tann partin, sum ikki kann skaða viðgerðina av málinum:

*Stk. 2.* Um umstøður, sum nevndar í stk. 1 bert gera seg galdandi fyri ein part av einum skjali, skal viðkomandi gerast kunnigur við restina av innihaldinum í skjalinum.

Eg skal tí kæra kommununa, fyri ikki at vísa til fullan lógartekst, sum hevur við sær at borgarin ikki verður kunnaður um allan lógartekstin.”

Klagarin hevði, tann 30. oktober 2024, sent Tórshavnar kommunu soljóðandi teldupost, har biðið var um innlit:

“Umbøn um alment innlit.

Eg skal vinaliga biða um alment innlit í málinum um flogvøllin á Glyvursnesi.

Í juni mánað í ár samtykti býráðið at nýta (upp til?) 500.000,- kr., at kanna hvar ein flogvøllur kundi vera á Glyvursnesi.

Úrslitið skuldi so leggjast fyri býráðið til endaliga støðutakan.

Lítið er frætt um hetta síðani, og tí fari eg at biða um alment innlit í hesum máli.

Tað snýr seg sostatt um samtyktir, gerðabøkur, hvør ger, og hvør er biðin um, at gera tær ymisku kanningarnar, bæði tøkniligar og fíggjarligar osv., og alt samskiftið sum hevur verið í málinum.

Eisini ynskist innlit í tey skjøl, tekningar, prognosur, metingar osv., sum higartil eru gjørd og sum samtyktin í býráðnum hevur heimilað.”

Tann 13. desember 2024 fekk klagarin soljóðandi noktandi svar frá Tórshavnar kommunu:

“...
Av misgáum hevur tú ikki fingið svar uppá innlitsumbøn tína niðanfyri, kommunan umber hetta.

Tað verður fráboðað, at innlit verður ikki latið í málið vísandi til Løgtingslóg um innlit í fyrisitingina § 13 stk. 5 og 6, sum eru soljóðandi:

§ 13. Rætturin til skjalainnlit kann avmarkast í tann mun tað er neyðugt til verju av munandi umhugsni viðvíkjandi
(…)
5) fíggjarligu áhugamálunum hjá tí almenna, herundir fremjing av vinnuvirksemi tess almenna ella
6) privatum ella almennum áhugamálum, har tað vegna serligar umstøður í hesum føri er neyðugt at dylja málið"

## 3. Viðmerkingar frá myndugleika og klagara

Tann 19. desember 2024 varð klagan send Tórshavnar kommunu til ummælis við longdari svarfreist til 22. januar 2025 vegna jólafrítíðina. Samstundis varð Tórshavnar kommuna biðin um at lata umboðsmanninum skjalayvirlit úr journalskipanini yvir málið um flogvøllin á Glyvursnesi.

Tann 28. januar 2025 minti umboðsmaðurin Tórshavnar kommunu á málið. Umboðsmaðurin fekk eina sjálvvirkandi móttøkuváttan, har millum annað stóð:

> "...Snarskivan kannar boðklivan allar yrkadagar. Tíni boð verða beind víðari til rætta viðkomandi í Tórshavnar kommunu. Krevur teldubrævið málsviðgerð, verður tað skrásett í okkara journalskipan, og tú frættir aftur frá okkum..."

Tann 4. februar 2025 sendi umboðsmaðurin Tórshavnar kommunu enn eina áminning, hesaferð stílað borgarstjóranum, við áminning um málið. Umboðsmaðurin fekk somu sjálvvirkandi móttøkuváttan.

Tann 17. februar 2025 sendi Tórshavnar kommuna umsíðir umbidnu frágreiðingina og skjalayvirlitið. Frágreiðingin vísti millum annað á, at málið var endurskoðað, og at innlit var givið:

> "...Tórshavnar kommuna skal umbera, at Umboðsmaðurin ikki hevur fingið svar upp á umbøn sína um eina frágreiðing um málið og skjalayvirlit úr journalskipanini.
>
> Talan er um innlitsmál, sum Tórshavnar kommuna sýtti fyri at geva innlit í tann 13. desember 2024. Hetta varð gjørt við tilvísing til § 13, stk. 1, nr. 5 og 6 í lógini um alment innlit. Hetta varð gjørt, tí vit ivaðust í, um tað kundi hava avleiðingar fyri fíggjarligu áhugamálini hjá Tórshavnar kommunu, herundir fremjing av vinnuvirksemi hjá kommununi, umframt áhugamálini hjá ... *(nevndari vinnufyritøku, mín viðm.)*, um innlit varð latið í málið.
>
> Henda avgerð er síðani endurskoðað, og avgjørt er at geva innlit í málið.
>
> Niðanfyri er avrit av telduposti, ið er sendur klagaranum og viðfest eru skjalayvirlit umframt skjølini, sum innlit er latið í.
>
> Hevur Umboðsmaðurin spurningar hesum viðvíkjandi, frættir kommunan aftur."

Við telduposti, tann 20. februar 2025, bað umboðsmaðurin Tórshavnar kommunu greiða nærri frá umstøðunum í málinum :

> “...
> Klagari bað um innlit tann 30. oktober 2024, men fekk ikki svar fyrr enn tann 13. desember 2024. Tá fekk klagari upplýst, at innlit varð sýtt, og at klagari av misgáum ikki hevði fingið svar fyrr.
>
> Umboðsmaðurin ynskir at vita, hvør orsøkin var til, at klagari ikki fekk svar fyrr enn tann 13. desember 2024.
>
> Umboðsmaðurin ynskir eisini at vita, hvør mannagongd varð nýtt í sambandi við viðgerðina av innlitsumbønini tann 13. desember, og um ekstrahering varð umhugsað.
>
> Harumframt ynskir umboðsmaðurin at vita, hvør orsøkin var til, at innlit hóast alt varð latið tann 17. februar 2025...”

Tann 13. mars 2025 sendi Tórshavnar kommuna umboðsmanninum soljóðandi frágreiðing:

> ”Umboðsmaðurin hevur í telduposti 20. februar 2025 sett nakrar spurningar um avgreiðsluna av einum innlitsmáli, tykkara j.nr. 24/28933.
>
> Umboðsmaðurin spyr í fyrsta lagi, hví umsøkjarin ikki fekk svar upp á umsókn sína um alment innlit fyrrenn 13. desember 2024.
>
> Víst skal verða á, at tað sæst ikki nágreiniliga í okkara innanhýsis samskifti, hví umsøkjarin ikki fekk svar upp á umsókn sína um alment innlit fyrrenn 13. desember 2024, hóast innlitsumbønin var dagfest 30. oktober 2024.
>
> Ein orsøk er tó helst, at ivi hevur verið um, hvørt innlit skuldi latast í tilfarið, sum lutvíst var kommununi í hendi 22. oktober 2024 – tvs. 8 dagar áðrenn innlitsumbønin varð send kommununi. Eingin viðgerð hevði verið av innkomna tilfarinum, hvørki innanhýsis ella við uttanhýsis aktørar, sum kommunan upprunaliga hevði samskift við um kanningarnar av einum framtíðar flogvølli.
>
> Av innanhýsis teldupostsamskifti dagfest 11. desember 2024 sæst, at fundur eftir øllum at døma hevur verið avtalaður við uttanhýsis aktørarnar, sum kommunan upprunaliga hevði samskift við, men at hesin fundur framvegis ikki hevði verið, tí hesir ikki høvdu havt møguleika at møta á fundi. Tað kann ikki útilokast, at hetta hevur havt samband við ætlaða fundin hjá borgarstjóranum við vinnuligu aktørarnar, sum man vildi hava fyrst, áðrenn innlit varð latið.
>
> Innanhýsis samskifti sæst hava verið um umbønina síðst í november, og eftir at tað 11. desember er staðfest, at innlitsumbønin framvegis ikki er svarað, verður gjørd ein meting av, um innlit skal latast ella ikki, og tann 13. desember verður svar sent umsøkjaranum, at innlit ikki verður latið í málið.
>
> Í mun til spurningin um, hví kommunan ikki svaraði umbønini fyrrenn 13. desember 2024, ber sostatt ikki til at staðfesta orsøkina ítøkiliga, tó at svarið helst er, at endaliga viðgerðin av, um innlit skuldi latast í tilfarið, ikki fór fram fyrrenn 13. desember 2024. Henda viðgerð átti at verið farin fram fyrr, so umsøkjarin fekk svar – ella í hvussu er eitt svar um, at umsóknin varð tikin til viðgerðar.

> Viðvíkjandi spurninginum um ekstrahering, so sæst í innanhýsis samskifti, at nortið er við henda møguleika í mun til at geva innlit í innanhýsis tilfar. Tá ið avgerð verður tikin, er eingin ekstrahering gjørd, tó at umsøkjarin í øllum førum átti at havt fingið innlit í málslýsingina í málinum, sum eisini frammanundan var almannakunngjørd á heimasíðuni hjá kommununi sum partur av gerðabókini hjá býráðnum frá fundinum 20. juni 2024.
>
> Viðvíkjandi spurninginum um, hví innlit hóast alt varð latið tann 17. februar 2025, so varð ein nýggj meting gjørd av umsóknini í sambandi við, at umsøkjarin hevði kært noktandi avgerðina hjá kommununi til Løgtingsins Umboðsmann. Upprunaliga metti kommunan, at tað kundi skaða ... *(vinnuligu áhugamálini hjá eini vinnufyritøku, mín viðm.)*, um innlit varð latið...
>
> Í sambandi við endurskoðaðu avgerðina tann 17. februar 2025 varð staðfest, at tað framvegis ikki hevði verið nøkur viðgerð av innkomna tilfarinum, sum umsøkjarin ynskti at fáa innlit í. Tað hevði heldur ikki verið nakar fundur við ... *(vinnufyritøkuna, mín viðm.)* ella uttanhýsis aktørar um spurningin. Eitt annað, sum hevði ávirkan á avgerðina, var, at borgarstjórin, sum upprunaliga hevði biðið um at fáa kanningarnar til vega og sjálvur hevði tosað alment um møguleikan at byggja nýggjan flogvøll í Suðurstreymoy, ikki longur var borgarstjóri, og tí var málið ikki eins aktuelt longur. Ítøkiliga varð tískil mett, at tað helst ikki var nakar vandi fyri, at ...*(vinnuligu áhugamálini hjá eini vinnufyritøku, mín viðm.)* skuldi vera fyri skaða ella tapi, um innlit varð latið í tilfarið. Tí varð umbønin gingin á møti við svarskrivinum 17. februar 2025."

Við telduposti tann 18. mars 2025 vórðu viðmerkingarnar hjá Tórshavnar kommunu, dagfestar 13. mars 2025, sendar klagaranum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Sama dag setti umboðsmaðurin Tórshavnar kommunu fyrispurning, um ummælið var fingið til vega frá tí fyritøkuni, sum kommunan millum annað hevði tikið atlit at í sambandi við viðgerð av innlitsmálinum.

Tann 1. apríl 2025 sendi Tórshavnar kommuna umboðsmanninum soljóðandi svar til spurningin:

> "...
> ...Umboðsmaðurin spyr, um Tórshavnar kommuna bað um ummæli frá ... *(vinnufyritøkuni, mín viðm.)*, áðrenn ávikavist noktandi avgerðina tann 13. desember 2024 og játtandi avgerðina tann 17. februar 2025.
>
> Til hetta er at siga, at svarið í báðum førum er nei.
>
> Undirritaði hevur viðgjørt málið, eftir at tað varð kært til Løgtingsins Umboðsmann, og eg havi ikki upplýsingar, sum geva ábendingar um, at málið hevur verið sent til ... *(vinnufyritøkuna, mín viðm.)* til viðmerkingar, tá ið mett hevur verið, at talan var um upplýsingar, sum kundu skaða ...*(vinnuligu áhugamálini hjá nevndu vinnufyritøku, mín viðm.)*, og sum kommunan tískil ikki vildi geva innlit í við tilvísing til § 13, stk. 1, nr. 5 og 6 í lógini um alment innlit.
>
> Undirritaði vil meta, at talan potentielt er um upplýsingar, sum kunnu skaða ...*( vinnuligu áhugamálini hjá eini vinnufyritøku, mín viðm.)* umframt almennu áhugamálini hjá Tórshavnar kommunu, og helst er hetta – saman við teirri sannroynd, at fundur ikki hevði verið aftur við eksternu vinnuaktørarnar - atlitið, ið hevur ligið til grund fyri avgerðini um at nokta innlit tann 13. desember 2025. Hetta byggi eg á, at undirritaði innanhýsis vísir á

hesa áseting í samskifti við kommunustjóran, sum síðani tekur avgerð um at sýta innlitsumbønini.

Viðv. játtandi avgerðini metti undirritaði, at talan kortini ikki var um upplýsingar, sum kundu skaða ... *(vinnufyritøkuna, mín viðm.)*. Henda meting tók støði í sjálvum upplýsingunum, samskiftinum í málinum, herundir fundarfrágreiðing frá fundi, har ... *(vinnufyritøkan, mín viðm.)* luttók. Mett varð ikki, at tað í sjálvum sær kundi skaða ... *(vinnufyritøkuna, mín viðm.)*, at kommunan hevði tikið stig til at gera nakrar kanningar av framtíðar flogvølli á Glyvursnesi/Kirkjubøreyni, og at fundur hevði verið við umboð fyri ... *(vinnufyritøkuna, mín viðm.)*, har víst varð á ávís sjónarmið hjá pilotum ... og at nakrar visualiseringar síðani vórðu framleiddar hesum viðvíkjandi. Atlit varð eisini tikið til, at einki var hent í málinum, eftir at visualiseringarnar vóru framleiddar, og at nýtt býráð hevði tikið við 1. januar 2025, og at hetta býráðið ikki hevði tikið nøkur stig til at brúka visualiseringarnar til eitt ávíst endamál. Tíðin, frá tí at kanningarnar fyrst vórðu umrøddar og til, at visualiseringarnar vórðu framleiddar, og til februar, tá ið avgerð varð tikin um at geva innlit í málið, hevði eisini týdning fyri ta meting undirritaði gjørdi í sambandi við tilmælið til kommunustjóran um at geva innlit í málið. Ítøkiliga varð mett, at upplýsingarnar ikki kundu hava við sær skaðandi virknað fyri ... *(vinnufyritøkuna, mín viðm.)*

Sæð í baksýni átti kommunan at havt viðgjørt málið og avgreitt upprunaligu innlitsumbønina nakað skjótari og í størri mun fingið ítøkiliggjørt ein møguligan skaða á ... *(vinnufyritøkuna, mín viðm.)*, um innlit varð latið í málið. Tað letur til, at málið um staðsetingina av einum nýggjum flogvølli ongantíð fekk eina gjølligari politiska viðgerð, hóast ætlanir vóru um hetta, og hetta tykist hava ávirkað málsviðgerðina við teirri avleiðing, at innlitsumbønin ikki varð avgreidd innan ásettu freistina í innlitslógini."

Av tí at umboðsmaðurin einki hevði frætt aftur frá klagaranum, og tað ikki varð mett neyðugt við framhaldandi partshoyringum, boðaði hann pørtunum frá við telduposti tann 4. apríl 2025, at farið var undir endaligu viðgerðina av málinum.

## 4. Niðurstøða

Viðgerð mín av hesum máli snýr seg um málsviðgerðina og málsviðgerðartíðina hjá Tórshavnar kommunu í sambandi við, at kommunan í avgerð, dagfest 13. desember 2024, noktaði fyri umbønini um innlit. Eg taki til eftirtektar, at kommunan játtar fult innlit í málið tann 17. februar 2025. Hóast komið verður inná hesa avgerð í viðgerðini niðanfyri, so havi eg ikki funnið orsøk at knýta nakrar viðmerkingar til hesa avgerð.

Hetta mál snýr seg í fyrsta umfari um, at Tórshavnar kommuna eftir 44 døgum gav klagaranum noktandi svar til umbøn hansara um innlit.

Biðið var um innlit tann 30. oktober 2024. Hóast klagarin fekk móttøkuváttan, varð innlitsumbønin ikki avgreidd fyrr enn tann 13. desember 2024.

Í øðrum lagi snýr málið seg um, at Tórshavnar kommuna hevði nýtt § 13 stk.1, nr. 5 og 6 í innlitslógini (løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina) sum grundgeving fyri at nokta fyri umbønini um innlit.

**Málsviðgerðartíðin**
Sambært góðum fyrisitingarsiði eigur ein almennur myndugleiki at skipa sínar arbeiðsgongdir soleiðis, at málsviðgerðin ikki gerst óneyðuga drúgv.

Um eitt mál ikki kann avgreiðast innan hóskandi tíð, ella málsviðgerðartíðin gerst drúgvari enn vanligt er, eigur myndugleikin at kunna borgaran um orsøkina til seinkanina, og nær tað kann væntast, at málið verður avgreitt.

Í § 16, stk. 2 í innlitslógini er ásett, at er ein áheitan um skjalainnlit ikki gingin á møti ella noktað innan 10 dagar eftir, at viðkomandi myndugleiki hevur móttikið hana, skal myndugleikin boða viðkomandi frá um orsøkina til hetta, og nær ein avgerð væntandi verður til skjals.

Sambært § 16, stk. 2 hevur myndugleikin sostatt eina fráboðanarskyldu. Ásetingin hevur eisini sum fyritreyt, at myndugleikin beinanvegin snarkannar eina umbøn um innlit, soleiðis at myndugleikin skjótast gjørligt er førur fyri at gera sær eina meting av, hvussu málsviðgerðin skal handfarast, og hvussu drúgv málsviðgerartíðin kann væntast at verða.

Fráboðanarskyldan, sambært § 16, stk. 2 í innlitslógini, er treytaleys. Tískil skal ein myndugleiki leggja síni viðurskifti soleiðis til rættis, at hann er førur fyri at geva eina rættstundis fráboðan um tey viðurskifti, ið gera, at málsviðgerðin av einari innlitsumbøn verður seinkað.

Í hesum føri varð umbønin um innlit ikki avgreidd, fyrr enn 44 dagar vóru farnir, síðani umbønin varð latin Tórshavnar kommunu. Tórshavnar kommuna hevði í hesum tíðarskeiði ikki givið nakra kunning til klagaran um orsøkina til seinkanina, og nær ein avgerð kundi væntast.

Hetta haldi eg vera átaluvert.

**Grundgevingin**
Í skrivi til klagaran, dagfest 13. desember 2024, vísir Tórshavnar kommuna einans til § 13, stk.1, nr. 5 og 6 sum grundgeving fyri at nokta fyri umbønini um innlit.

Ásetingarnar um grundgeving eru at finna í §§ 21 - 23 í fyrisitingarlógini (løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg).

Skyldan at grundgeva er ein av meginreglunum í fyrisitingarrættinum, ein sonevnd garantiregla, sum skal tryggja, at myndugleikin tekur eina avgerð á røttum og lógligum grundarlagi.

Sambært § 21 skal ein avgerð, tá hon verður fráboðað skrivliga, hava eina grundgeving uttan so, at avgerðin til fulnar gongur partinum á møti.
Sambært § 23, stk. 1 og 2 skal grundgevingin hava eina tilvísing til tær rættarreglur, sum avgerðin er grundað á. Avgerðin skal í tann mun, tað er neyðugt, hava eina stutta frágreiðing um tær veruligu umstøður, sum avgerðin byggir á. Í teimum førum avgerðin byggir á eina fyrisitingarliga meting, skulu tey atlit, sum avgerðin byggir á, síggjast aftur í grundgevingini.

Grundgevingin skal hjálpa einum borgara betri at skilja eina avgerð og góðtaka hana. Henda skal tryggja, at móttakarin hevur møguleika fyri at kanna, um avgerðin er røtt, at grundarlagið fyri avgerðini er sakligt, og at málið er nøktandi upplýst, áðrenn avgerð verður tikin.

Eg haldi, at grundgevingin, ið Tórshavnar kommuna hevur givið klagaranum í skrivinum, dagfest 13. desember 2024, ikki lýkur kravið um grundgeving í fyrisitingarlógini. Tá víst verður til § 13, stk.1, nr. 5 og 6 í innlitslógini, átti Tórshavnar kommuna eisini at greitt frá, hví kommunan var komin til ta niðurstøðu, at umbønin um innlit ikki kundi latast, vísandi til hesa rættarreglu, umframt hvørji atlit høvdu verið avgerandi fyri hesari avgerð. Einans at vísa til rættarregluna sum grundgeving er als ikki nøktandi.

**Heimildin**
Tórshavnar kommuna vísur til § 13, stk.1, nr. 5 og 6 í innlitslógini sum heimild fyri at nokta fyri innlitsumbønini.

§ 13, stk. 1, nr. 5 og 6 er soljóðandi:

> § 13. Rætturin til skjalainnlit kann avmarkast í tann mun tað er neyðugt til verju av munandi umhugsni viðvíkjandi
> …
> 5) fíggjarligu áhugamálunum hjá tí almenna, herundir fremjing av vinnuvirksemi tess almenna ella
> 6) privatum ella almennum áhugamálum, har tað vegna serligar umstøður í hesum føri er neyðugt at dylja málið
> ...

§ 13, stk. 1, nr. 5 er eitt nú ætlað sum heimildargrundarlag hjá myndugleikanum, um talan er um samráðingar hjá tí almenna við fakfeløg um løn og onnur starvsfólkaviðurskifti. Eisini er rættarreglan ætlað sum heimildargrundarlag í sambandi við, at myndugleikin eitt nú ger avtalur um keyp og sølu av fastogn. Harafturat er rættarreglan ætlað sum heimildargrundarlag í sambandi við, at myndugleikin innheintar tilboð um keyp. Sí Betænkning nr. 1510. Betænkning om Offentlighedsloven, s 678 – 681.

Endamálið, við at innlit kann verða undantikið, sambært § 13, stk. 1, nr. 5, er, at samráðingarstøðan hjá tí almenna skal verjast. Til tess, at myndugleikin kann nýta rættarregluna, er í øllum førum neyðugt, at talan er um eina ítøkiliga samráðingarstøðu, og at myndugleikin ítøkiliga vísur á, í hvønn mun talan er um neyðuga verju av “munandi umhugsni”.

Tað er mín meting, at Tórshavnar kommuna, sambært sínum frágreiðingum, ikki hevur verið í einari ítøkiligari samráðingarstøðu og ei heldur hevur víst á nøkur viðurskifti, har tað hevur verið neyðugt at verja “munandi umhugsni” hesum viðvíkjandi.

§ 13, stk. 1, nr. 6 er ætlað sum ein heildartreyt (da. generalklausul), ið kann loyva myndugleikanum at nokta fyri at lata innlit í upplýsingar, um myndugleikin kann vísa á ítøkilig viðurskifti, har tað er púra greitt, at týðandi atlit gera, at rætturin til skjalainnlit má avmarkast.
Tað er mín meting, at Tórshavnar kommuna, í sínum frágreiðingum, ikki hevur víst á nøkur ítøkilig viðurskifti, har tað er púra greitt, at týðandi atlit gera, at rætturin til skjalainnlit má avmarkast. Sí Betænkning nr. 1510, Betænkning om Offentlighedsloven, s 681 – 686.

Í mun til § 13, stk. 1, nr. 5 og 6 gevi eg mær eisini far um, at Tórshavnar kommuna ikki hevur hoyrt vinnufyritøkuna um tey atlit, ið gjørdu, at Tórshavnar kommuna metti, at rætturin til skjalainnlit mátti avmarkast. Slík hoyring má metast sum ein vanlig og neyðug mannagongd í hesum sambandi.

Vísandi til frágreiðingar frá Tórshavnar kommunu og vantandi hoyringina av vinnufyritøkuni er tað samanumtikið mín fatan, at lýstu viðurskiftini millum Tórshavnar kommunu og vinnufyritøkuna í flogvallarspurninginum ikki kunnu rúmast í heimildargrundarlagnum í § 13, stk. 1, nr. 5 og 6. Henda fatan verður stuðlað av, at Tórshavnar kommuna, longu tveir mánaðir seinni, letur klagaranum fult innlit í málið, eisini uttan at hoyra vinnufyritøkuna.

**Ekstrahering**
§ 13, stk. 2 í innlitslógini sigur, at um umstøður, sum nevndar í § 13, stk. 1, bert gera seg galdandi fyri ein part av einum skjali, skal viðkomandi gerast kunnigur við restina av innihaldinum í skjalinum. Soleiðis, sum málið er lýst, hevur Tórshavnar kommuna ikki tikið hædd fyri hesari skyldu í sambandi við innlitsmálið. Hetta haldi eg vera atfinningarsamt.

**Klagumálsviðgerðin**
Undir klagumálsviðgerðini, í sambandi við, at klagan varð send Tórshavnar kommunu til ummælis, noyddist eg í tveimum umførum at minna Tórshavnar kommunu á málið. Freistin at svara varð upprunaliga sett til 22. januar 2025, men Tórshavnar kommuna svaraði ikki fyrrenn tann 17. februar 2025. Vísandi til at ein partur av klaguni snúði seg um drúgvu málsviðgerðartíðina hjá Tórshavnar kommunu, haldi eg, at kommunan átti at verið vitandi um týdningin av at halda tær freistir, ið settar vórðu til klagumálsviðgerðina.

**Samanumtøka**
Eg fari samanumtikið at geva Tórshavnar kommunu eina átalu fyri málsviðgerðina av innlitsumbønini og málsviðgerðina í sambandi við klagumálsviðgerðina hjá umboðsmanninum.

Hanna Vang
Løgtingsins umboðsmaður